## Norðurlendsk summarstevna fyri sálarsjúk í Føroyum

Mánadagin 7 juni byrjaði ein summarstevna fyri sálarsjúk í øllum Norðurlondum. Tað er Sinnisbati, ið skipar fyri stevnuni, ið verður hildin í Vágunum.

Sinnisbati er nevndarlimur í stóra, norðurlendska felagnum "Nordisk Forening for Sosial og Mental Helse", ið hvørt ár hevur eina summarstevnu. Í ár eigur Sinnisbati so tørn at skipa fyri. Í 1993 varð stevnan somuleiðis hildin í Føroyum, og tá var hon sera væleydnað.

Luttakarar úr Íslandi, Norra, Føroyum, Álandi, Svøríki, Danmark og Finnlandi verða við á stevnuni, sum endar sunnudagin 13. juni.

Føroyskir luttakarar, sum hava verið við á tílíkum stevnum siga, at hetta tiltakið hevur borið teimum nógv gott og virðismikið, bæði likamliga og sinnisliga.

eys

## Ársins songrødd 2004 funnin



Leygarkvøldið 5. Juni var seinasta umfar av sangkappingini ársins songrødd funnin, og tá avtornaði gjørdist tað Barbara Abrahamsen úr Havn, sum vann. Hon sang "Come what may" úr filminum Moulin Rouge.

Kristley Hansen úr Kollafirði varð nummar tvey við sanginum "White Flag" hjá Dido.

Nummar trý bleiv Eyðstein Jacobsen úr Hvalba. Hann sang "Angels" hjá Robbie Williams.

Fyrireikararnir eru longu farnir undir næstu kapping, og teir arbeiða í løtuni við at fáa samstarv í lag við Svf, um at gera sendingar til Ársins Songrødd 2005.

eys



# Børnini áttu býin

**Fríggjadagin 4.juni var endabresturin av stóra tiltakinum "Havnin ein býur har børnini trívast". Bæði børn og vaksin hugnaðu sær óført, og tað sást týðuliga, at børnini vórðu glað um, endiliga at sleppa at sýna fram tað, sum tey høvdu vant í so langa tíð.**

BARNAGARÐSBØRN
*Eydna Skaale*
*Eydna@sosialurin.fo*

Veðurforsagnirnar undan fríggjadegnum vóru ikki tær bestu, og fríggjamorgunin var veðrið eisini keðiligt, men tá til stykkis kom, sá tað út til, at veðurgudarnir hóast alt stuðlaðu børnunum í teirra framførslu. Og hon eydnaðist eisini sera væl. Nógv fólk var samankomið at lurta, bæði avvarðandi at børnunum og eisini dagrøktarmammur, pedagogar við yngri barnagarsbørnum og ein hópur av øðrum høvdu leitað sær oman í Grasagarð.

Har var sangur og spæl, og eg má undrast, at børnini vóru so still og konsentrerað ígjøgnum alla framførsluna. Tey sungu ymiskar sangir um várið, til onkrar sangir gjørdu tey tekin ímeðan tey sungu og tey høvdu eisini evnað sær instrument, sum tey nýttu til onkran sang.

Sangurin rungaði eftirí, og tað sást veruliga, at teimum dámdi sangirnar. Eitt tekin um, at tey hava havt tað gott og fingið nakað burturúr úti á verkstøðunum. Tað sást eisini, at teimum dámdi at framføra, og at vera í fokus hjá øllum áhoyrarunum. Har var einki sum líktist framførðslótta, ístaðin nutu tey tað og hugnaðu sær óført..

Fyri lættari at halda skil á øllum børnunum, høvdu tey øll eitt toystykki bundið um høvdið, og bólkarnir høvdu so ymsar litir, so bæði børnini og tey vaksnu allatíðina sóu hvør hoyrdi til hvar. Í hvørjum bólki var so eisini ein pedagogur, ið bar eitt flagg við sama liti. Eitt sera gott hugskot.

Eftir sangin í Grasagarði, gingu børnini skrúðgongu oman í býin, og tey hildu tað vera fantastiskt, at miðbýurin var stongdur fyri allari ferðslu, bara fyri teirra skyld. Tað sást týðuliga hvussu errin tey vóru av at verða tikin í so stórum álvara.

Niðri á Vaglinum helt borgarstjórin eina stutta røðu um hvussu alt var, táið hann var barn, og so sluppu børnini upp á gólv. Eisini her vórðu tey ógvuliga konsentrerað og fylgdu væl við, hvat tey skuldu gera og nær tað skuldi gerast, og tey kvóðu so tað rungaði eftirí. Stevið var kanska ikki av tí allarbesta, men tað gjørdi minni.

Alt í alt, var hetta eitt sera gott og væleydnað tiltak, og ein ikki minni góð og vælegnað framførðsla, sum veruliga prógvaði, at børnini hava fingið nógv burturúr hesum døgunum.











# Hópuppsagnir í Sørvági

**Umleið 30 ársverk eru færri at forvinna á havnarlagnum í Sørvági, nú kryvjivirkið hjá Sørvágs Laksi er afturlatið og alt fólkið koyrt til hús**

ALIVINNA
*Edvard Joensen*



*Aliringarnir á sørvágsfirði eru nú tómir, og alt virksemi verður riggað av eftir greiðum, ásettum reglum. Einki verður sett í aftur ringarnar fyrr enn í fyrsta lagi komandi vár*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Sørvági:**
Eini 30 fólk gjørdust arbeiðsleys í Vágum í seinastu viku, tá laksakryvjivirkið í Sørvági lat aftur. Einki verður sett út aftur fyrr enn komandi vár, sigur stjórin á Sørvágs Laksi.

Gardar Joensen, stjóri á Sørvágs Laksi sigur, at teir ganga nú einir fýra mans eftir og rigga av. Tað skal gerast eftir ávísum reglum fyri at fáa karantenutíðina at galda, sigur hann.

Teir hava tømt fjørðin, og í ár munnu eini 3.000 tons vera tikin, sigur hann. Teir eru slopnir av við allan fiskin, men prísurin hevur ikki verið nakað serligur. Eina stutta tíð var hann oman fyri 20,- krónur, men tað vardi ikki leingi. Skal tað bera til at ala laks, skal prísurin helst liggja um tær 20,- krónurnar ella meira, sigur Gardar Joensen.

– Tá nú avriggað er, fara maskinur og onnur gøgn helst at verða standandi og bíða eftir, at lív kemur íaftur. Tað hevði helst verið ringt at sloppið av við nakað kortini, tí tað er nokk ikki so stórur áhugi fyri at keypa, heldur hann.

Hóast allar reglur um karantenu verða hildnar, er eingin trygd fyri, at sjúka ikki kann stinga seg uppaftur, tá farið verður at seta út av nýggjum, ásannar Gardar Joensen. Men hetta er so ein vági, hann verður noyddur at liva við, um ætlanin er at halda fram við aling, sigur hann.

Um framtíðarútlitini sigur Gardar Joensen, at um loyvt verður at koppseta, og kvotur verða lagdar á í ES, kann tað henda, at prísurin verður so mikið høgur, at tað kann loysa seg at ala aftur. Onnur boð hevur hann ikki í løtuni.

Hvat er vorðið av teimum umleið 30 fólkunum, sum gjørdust arbeiðsleys í seinastu viku, veit hann ikki rættiliga, sigur stjórin á Sørvágs Laksi. Men tey ganga helst fyri einki enn, væntar hann.

# Taka flag av friðaðum øki

**Seinastu dagarnar hevur flag til húsatekju verið grivið við Mjáuvøtn. Talan er um friðað øki, og tí má flagið ikki takast haðani uttan loyvi**

NÁTTÚRUFRIÐING
*Edvard Joensen*



*Flagið er grivið av frammi við Mittastavatn. Tað skal brúkast til at tekja við. Men hetta er ikki loyvt, tí økið er friðað, sigur sýslumaðurin, sum er formaður í friðingarnevndini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Frammi við Mjáuvøtn hava menn seinastu dagarnar tikið flag av einum friðaðum øki. Flagið skal brúkast til húsateking.

– Tað er ikki loyvt, sigur sýslumaðurin í Vestmanna, og biðið er heldur ikki um loyvi. Festarin hevur fingið átalu fyri grevsturin.

Tað er á einum festi hjá Jarðarráðnum, at grivið er. Hetta er komið fyri fyrr, sigur Ivan Klein Olsen, Streymoyar sýslumaður. Einki mál er tó reist í hesum sambandi, men festarin hevur fingið at vita, at tað má ikki endurtaka seg.

Økið er friðað, men kann tó veltast til landsbúnaðarendamál, greiðir sýslumaðurin frá. Men í hesum førinum er talan um tilfar til húsabygging, og húsabygging er als ikki loyvd á økinum. Tó eru loyvi givin til at byggja hús á økinum, sum bygd verða í beinleiðis sambandi við landsbúnað. Sum til dømis seyðahús, sigur sýslumaðurin.

Friðingin merkir, at ikki er loyvt at taka sand, eyr, mold, ella á annan hátt órógva djóra- ella plantulív á økinum. Alt skal liggja í sinum nátúrliga uppruna og ikki órógvast av mannaávum.

Tá flag verður tikið, verður samstundis órógvað, hóast tað, at tað ivaleyst skjótt grør aftur, ásannar sýslumaðurin.

Hetta økið við vøtnini hevur fyrr verið í brennideplinum í samband við náttúrufriðing. Seinast var, tá grivið varð á sandinum niðanvert Leynavatn uttan loyvi frá friðingarnevndini. Tá vórðu boð givin um at leggja grevsturin aftur.

# Vilja vinna Vágar

**Kvinnurnar ætla at blanda seg álvarsliga upp í kommunalpolitikkin í Vágum í framtíðini. Farið verður undir upplýsandi fundarrøð í vikuni**

KOMMUNALPOLITIKKUR
*Edvard Joensen*

**Vágar:**
Vágakvinnur ætla sær av álvara at gera seg galdandi í kommunalpolitikkinum. Tær hava skipað ein bólk, sum fer undir kunningarherferð at upplýsa um kommunalpolitikk sum heild, og serliga um, hvat kvinnur vilja í hesum sambandi.

Ein bólkur, sum nevnir seg Kvinnubólkurin í Vágum, hevur tikið stig til eina fundarrøð í oynni, har dentur verður lagdur á, at kvinnur tosa um kommunalpolitikk.

Fundirnir verða hildnir í øllum teimum størru bygdunum í Vágum, og fyrsti fundurin verður í Gamla Skúla í Sandavági fríggjakvøldið 11. juni klokkan 19.00. Síðan verður ein fundur í kommunuhúsinum í Sørvági mikukvøldið 16. juni klokkan 20.00, og tann triðji verður í kommunuhúsinum í Miðvági mikukvøldið 23. juni klokkan 20.00.

Marjun í Kálvalíð í Miðvági er ein teirra, sum hevur tikið stig til hetta tiltakið.

Hon sigur, at ætlanin er at fáa kvinnur, sum hava luttikið í kommunalpolitikki, at siga frá hesum arbeiði, eins og ætlanin eisini er at fáa tær, sum ætla sær at stilla upp til kommunuvalið í heyst, at greiða frá, hvat teirra hugsjón er, hví tær stilla up, hvat tær kunnu meira enn tey, sum frammanundan sita í bygdarráðunum, og so framvegis.

Dentur verður lagdur á at fáa so breiða geografiska umboðan sum gjørligt, siga tær, sum skipa fyri fundarrøðini í Vágum um kvinnur í kommunalpolitikki.



*Jónhild Jørgensen Miðvági er ein teirra, sum fer at siga frá um kvinnur í kommunalpolitikki. Hon hevur sjálv luttikið í kommunalpolitikki í Vágum, og hevur seinasta skeiðið verið formaður í Felagskommununi í Vágum*

*Mynd: Edvard Joensen*